## 2. deild menn

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 13.09 | Víkingur-EB/S | Karl M. Poulsen |
| 13.09 | KÍ-B36 | Kristian S. Petersen |
| 13.09 | TB-AB | Páll Augustinussen |
| 13.09 | Undri-07 Vestur | Eugen Voda |

## 1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| **13.09** | **KÍ-Víkingur** | **Elsa Andreasen** |
| 13.09 | Skála-B68/NSÍ | Jákup L. Stenberg |
| 13.09 | EB/S-AB | MB |



## Soleiðis spæla botnliðini

**ÍF:**
12. september: KÍ á heimavølli
16. september: 07 Vestur á útivølli
20. september: HB á heimavølli
27. september: EB/Streymur á útivølli
3. oktober: NSÍ á heimavølli

**B36:**
13. september: HB á heimavølli
16. september: EB/Streymur á útivølli
20. september: NSÍ á heimavølli
27. september: Víkingur á útivølli
3. oktober: B68 á heimavølli

**07 Vestur:**
13. september: AB á útivølli
16. september: ÍF á heimavølli
20. september: KÍ á útivølli
27. september: B68 á útivølli
3. oktober: HB á heimavølli

**KÍ:**
13. september: ÍF á útivølli
16. september: B68 á útivølli
20. september: 07 Vestur á heimavølli
27. september: HB á útivølli
3. oktober: EB/Streymur á heimavølli

grundgevingin oftast ikki haldbar. Tildømis søgdu umboð frá B36 í miðlunum undan kappingarbyrjan, at liðið fór at fáa tað torført. Leiðslan valdi at seta óroynda Mikkjal Thomassen í venjarasessin, og leiðslan gjørdi honum greitt, at hann helst fór at fáa tað trupult. Tá kanst tú ikki geva honum sparkið, tí úrslitini ikki eru nøktandi, sigur Helgi L. Petersen.

Dømi um venjarar, sum seinastu árini eru sagdir úr starvi eru David Jones í ÍF, Tony Paris í KÍ, Oddbjørn Joensen í AB, Jóannes Jakobsen í B68 og Krzyzstof Popczynski í HB og TB.

### AB hevur dugað betur

AB varð av fleiri mett sum ein av komandi niðurflytarunum í summarsteðginum. Tá vóru argjamenn bara fýra stig frá teimum niðastu liðunum, men nú eru uppflytararnir av Argjum heili 12 stig frá niðurflyting.

Helgi L. Petersen metir, at tilgongdin, sum AB fekk í summar, var væl gjøgnumhugsa. Hini botnliðini dustsúgvaðu bara tað, ið var leyst, sum viðmerkjarin málber seg.

- Fólk bíðaðu bara eftir, at argjamenn skrambláðu saman. Men venjararnir fingu sær leikarar í steðginum, sum liðið veruliga hevði tørv á. Málverjin Tórður Thomsen hevur verið framúr, Mortan úr Hørg hevur staðið seg væl á vongverjaplássinum og Stig-Roar Søbstad hevur verið vandamikil og skotið mál, sigur Helgi L. Petersen, og rósar venjarunum á Argjum.

- John Petersen var eisini skjótur at finnast at sínum leikararum, tá liðið hevði staðið seg væl í nakrar vikur. Leikararnir vóru brádliga hástórir, men teir fingu ein vátan frammaná. Hann vísti á, at argjamenn framvegis eru uppflytarar og liðið skuldi stríðast og strevast til tað seinasta. Allan Mørkøre og John Petersen hava fingið tað besta burturúr, og teir eru júst rættir menninir til starvið, greiðir Helgi L. Petersen frá.

### Øll eru ov góð

ÍF, B36, 07 Vestur og KÍ. Tað er greitt, at tvey av hesum feløgum ikki eiga umboð í bestu føroysku fótbóltsdeildini í 2010. Í løtuni eru tað ikki fleiri enn fimm stig millum botnliðið og nummar sjey. Tí verður tað neyvan avgjørt fyrr enn á síðsta leikdegi, hvør verður niðurflytari.

- Øll hava framvegis møguleikan at bjarga sætinum. Og tað er sera, sera torført at siga, hvør verður á aftastu plássunum eftir seinasta leikumfar. Satt at siga eru øll botnliðini ov góð til at flyta niður, sigur Helgi L. Petersen.

## Helgi metir um dystirnar

### ÍF – KÍ 1

- Fuglfirðingar kunnu við einum sigri leygardagin tryggja sær sætið í Vodafonedeildini komandi ár. Og á heimavøllinum, har teir ikki hava tapt síðan 1. juni, vænti eg, at teir fáa trý stig. Men tað verður ikki lætt, tí KÍ skal hava stig sum skjótast. Um tað vil heilt illa til hjá klaksvíkingum, kann niðurflytingin nær um staðfestast um vikuskiftið.

### B36 – HB 2

- Stigatalvan prógvar, at HB er væl betri enn B36. Og tí fara komandi føroyameistararnir at vinna í Gundadali sunnudagin. HB kann samstundis staðfesta gullið móti grannunum, sum eru í tungum sjógvi, og tað verður stór movitatión. Eg vænti, at HB vinnur tepurt.

### AB – 07 Vestur X

Ein sera, sera torførur dystur at meta um. AB hevur ikki verið í niðurflytingarvanda seinastu vikurnar, men hóast tað hevur liðið vunnið fleiri stig. 07 Vestur er hinvegin farið undir eina bjargingaroynd, og hevur ikki tapt tríggjar ferðir upp í slag. Spurningurin er, um argjamenn framvegis eru hugagóðir og fara at stríðast, hóast liðið sum so einki hevur at spæla fyri. Eg vænti mær fleiri mál í hesum dystinum.

# ÍF fer at hóra undan

Helgi L. Petersen væntar ikki, at fuglfirðingar fara at flyta niður. Teir hava í løtuni fimm stig til níggjunda plássið, og tað hevur avgerandi týdning, sigur hann.

- ÍF kann tryggja sær sætið við at vinna ein ella tveir dystir afturat. Tað er ein lyklastøða samanborið við hini botnliðini. Teir skulu spæla tríggjar ferðir á heimavølli, og tí skal ganga sera illa í hond hjá fuglfirðingum, um teir ikki varðveita sætið í deildini. Tað restar í øllum førum lítið í hjá Jón Simonsen og hansara leikarарum, sigur Helgi L. Petersen, sum leggur afturat, at avgerðin kanska fellur longu leygardagin, tá KÍ vitjar í Fuglafirði.

### Gundadalur er eingin skansi

Komandi fimm uppgávurnar hjá B36 eru móti liðum, sum eru á ovaru helvt á stigatalvuni. Tað sær Helgi L. Petersen als ikki sum ein fyrimun hjá árstalsfelagnum.

- Eg vil greitt siga, at tað er ein vansi. Liðið fekk eina dreymabyrjan, men hevur fingið millum lítið og einki burtur úr seinastu 18 dystirnar. Leikararnir hava havt lítið av viðgongd, og tað merkist. B36 skal minst fáa seks stig afturat, men í løtuni er tað ikki nógv, ið bendir uppá, at tað fer at eydnast. Komandi mótstøðuliðini skulu stríðast fyri altjóða fótbólti, pengum og heiðursmerkjum, og tey vilja helst fegin gera sítt til, at B36 ikki verður millum tey bestu. Gundadalur hevur ikki verið ein skansi hjá liðnum í ár, og tí verða heimadystirnir móti B68 og NSÍ sera torførir, sigur Helgi L. Petersen.

Men er liðið ikki ov gott til at flyta niður?

- Tað hugsa fleiri, men tað meti eg ikki. Hóast alt er liðið ikki betri enn hini botnliðini, um tú hyggur at leikarunum. Men í B36 meta tey framvegis, at liðið er eitt topplið. Og tí verður tað ikki ónátturligt hjá teimum at skula vinna móti HB, í Streymnesi og í Gøtu. Tað hava teir gjørt fleiri ferðir áður. Tí vænti eg ikki, at B36 fer at flyta niður. Ein fyrimunur er eisini, at liðið kann tapa dystir, uttan at tað fær beinleiðis ávirkan á hini botnliðini. Stigini fara ikki til ÍF, 07 Vestur og KÍ, men til ovaru liðini, greiðir Helgi L. Petersen frá, sum serliga væntar sær nógv av Jákupi á Borg seinastu dystirnar.

- Hann hevur verið partur av oddanum í landskappingini seinastu 12 árini, og eg veit, at hann als ikki góðtekur at flyta niður, sigur Helgi L. Petersen.

### 07 Vestur fer at hótta

07 Vestur er nú aftur við í stríðnum um at varðveita sætið í deildini. Liðini hevur lagt klaksvíkingar aftur um seg á stigatalvuni, og Helgi L. Petersen væntar, at felagsliðið úr Vágum fer at seta B36 undir stórt trýst.

- Liðið hevur ofta tapt fleiri stig í seinastu løtu. Og hóast teir hava skotið fleiri mál og staðið seg væl, so hevur mótstøðuliðið altíð verið omaná, tá avtornar. Soleiðis hevur brádliga ikki verið seinastu vikurnar. Í framrættaða spælinum eru teir sera vandamiklir, har Tór-Ingar Akselsen, Tamba Yarjah, Morris Lewis og Jens Erik Rasmussen serliga hava staðið seg væl.

Er tað hugsandi, at 07 Vestur fer at hóra undan?

- Ja, heilt víst. Men eg vænti ikki, at teir klára tað. Eg dugi ikki at ímynda mær, at teir fáa B36 aftur á stigatalvuni. Teir hava sjálvsálit og eru við gott mót. 07 Vestur fer at hótta ovaru liðini, og tí krevur tað, at serliga B36 skal fáa nøkur stig afturat, sigur Helgi L. Petersen.

### KÍ verður niðurflytari

Kappingarárið 2009 fer helst at standa í søgubókunum hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag sum ein vanlukka. Sigursvandað felagið hevur verið í tungum sjógvi alt árið, og um Helgi L. Petersen skal geva eitt boð, spæla teir ikki í bestu deildini komandi ár.

- Leiðslan gav teimum ungu leikarunum møguleikan í ár, men tá tað ikki hilnaðist serliga væl, varð liðið styrkt munandi. Og tilgongdin av Toda Jónsson, Hjalgrími Elttør, Høgna Madsen, Páll Klettskarð, sum nú er farin aftur til Danmarkar, og Atla Danielsen er liðið á pappírinum sanniliga nógv betri. Men eingin av teimum er beinleiðis verjukendur. Eg vildi mett, at tað var náturligt hjá botnliðum, at tú keypti ein verjuleikara fyri at stabilisera liðið. Og tað hevur manglað higartil, sigur Helgi L. Petersen.

Hvørja ávirkan fær Petur Mohr?

- Hann hevur nú havt tvær vikur at sett sín dám á liðið. Og hyggja vit at søguni, er greitt, at klaksvíkingar undir hansara leiðslu fara at stríðast. Men tað er kanska síðsta útkall hjá KÍ longu sunnudagin, og tí vænti eg ikki, at teir sleppa undan niðurflyting, sigur Helgi L. Petersen.